Milliardir brúkast til risaoljufelt millum Føroyar og Hetland



Nú skal rørlei›ing at flyta gass frá oljukeldunum vi› føroyska marki› leggjast á havbotnin til Hetlands. Ta› kann hava t‡dning fyri Føroyar eisini í framtí›ini

JAN MÜLLER

Eftir øllum at døma kemur nú gongd á útbygging av n‡ggjum oljufeltum á Atlantsmótinum, vestan fyri Hetland. Naka›, sum eisini kann fáa óbeinlei›is t‡dning fyri oljuleiting vi› Føroyar. Stjórin í BP, eini av heimsins størstu fyritøkum, Sir John Browne hevur júst bo›a› frá, at felagi› nú fer undir veruligar fyrireikingar til at útbyggja risastóra oljufelti› Clair, sum var› funni› í 1978. Einki hevur veri› gjørt vi› felti› higartil, tí ta› hevur veri› mett tøkniliga sera trupult. Nú er tøknifrø›in so miki› framkomin, at ta› ver›ur mett rá›iligt og lønandi at fara undir oljuframlei›slu frá feltinum. 750 mill. dollarar eru settir av til at gera fyrireikingar og til framlei›slupall oa. ella umlei› 5-6 milliardir kr. Framlei›slan skal byrja í 2004.

Eisini er ta› áhugavert fyri føroyingar og eina møguliga komandi oljuvinnu um okkara lei›ir, at BP stjórin hevur givi› grønt ljós til eina verkætlan uppá 500 mill. dollarar ella 3-4 milliardir krónur at leggja eina rørlei›ing á havbotnin frá oljufeltunum Foinaven og Schiehallion (skamt frá føroyska markinum) til Sullom Voe oljuterminalin í Hetlandi og ví›ari til Magnus oljufelti› nor›an fyri Hetland. Endamáli› vi› hesum projekti er at flyta alt yvirskotsgassi› frá Foinaven og Schiehallion via Sullom Voe til Magnus, har gassi› ver›ur sprænt ni›ur í oljugoymslurnar fyri á tann hátt at fáa meiri olju upp næstu árini. Vi› hesum projektinum kann liviti›in hjá Magnus-feltinum longjast vi› fimm árum.

Rørlei›ingin er áhugaverd, tí hon er fyrsta roynd at flyta og selja gass frá einum felti á Atlantsmótinum. Hon er tí eisini fyrsta veruliga roynd at byggja upp ein infrastruktur í økinum, sum liggur tætt upp at leitiøkjunum á føroyska landgrunninum. Hetta kann tí koma at hava stóran t‡dning fyri komandi framlei›slu á føroyskum øki eisini í framtí›ini, eitt nú um hugsa› ver›ur um komandi gassfund hjá okkum. Trupulleikin vi› gassinum er oftani tann, at tú sleppur ikki av vi› ta›, tí eingin rørlei›ing er. Nú ver›ur so 1. stig tiki› til slíka gasslei›ing stutt frá føroyska leitiøkinum. Verkætlanin er eisini umhvørvisliga áhugaverd, tí nú slepst undan at koyra gass út í luftina. Ikki færri enn 3o oljufeløg hava veri› vi› í tilrættaleggingini av verkætlanini, sum fer at fáa stóran t‡dning fyri oljuídna›in í Bretlandi og ikki minst fyri lokalsamfelagi› í Hetlandi. Og sum sagt fer hon eisini óbeinlei›is at fáa t‡dning fyri Føroyar sum komandi oljuland.

GEM helst broytt í ár

JAN MÜLLER

Nú hol er sett á 1. útbjó›ingarumfar í Føroyum kemur hetta eisini at hava broytingar vi› sær hjá teimum, sum arbei›a vi› olju- og umhvørvismálum. Tá oljufeløgini av álvara fóru undir forkanningar sínar vi› Føroyar seinnu helvt av 90-unum var› avgjørt at seta á stovn ein felagsskap, sum fevndi um bæ›i føroyskar myndugleikar og oljufeløg. Endamáli› var m.a. at samskipa umhvørvisarbei›i› undan oljuleiting í GEM.

GEM hevur veri› virki› á nógvum økjum sí›ani tá, og í løtuni ver›ur arbeitt vi› at broyta ella tillaga GEM til komandi avbjó›ingar. Innan fyri næstu mána›irnar fer at koma eitt uppskot um, hvussu framtí›ar GEM skal skipast. Ein orsøk til slíkar broytingar er tann, at ta› nú ver›ur fari› frá einum stigi í oljutilgongdini til eitt anna› - frá einum forkanningarskei›i til veruliga leiting og helst eisini framlei›slu.

Broytingar kunnu eisini standast av, at fleiri av feløgunum, sum hava veri› sera virkin í GEM, nú als ikki ver›a vi› í komandi leiting. Hvørji teirra vilja halda fram í GEM og hvørki taka seg fult og heilt úr Føroyaøkinum! Hetta eru spurningar, sum arbeitt ver›ur vi›.

GEM arbei›ir í løtuni vi› fleiri ymsum verkætlanum, sum ma. hava vi› umhvørvi og trygd at gera. Almenningurin kann fáa lutvíst innlit í arbei›ini, sum GEM ger, vi› at fara inn á heimasí›una gem.fo

Hilmar Eliassen (og ikki Danielsen, sum vit skriva›u hósdagin í farnu viku) arbei›ir hjá Atlanticon og er GEM-samskipari. Hann tekur sær av virkseminum hjá oljufeløgunum í sambandi vi› GEM og samskipar arbei›i›. Hilmar Eliassen tók vi› starvinum 1. mars í ár eftir Dávid R. Hansen. Uppgávurnar hjá GEM ver›a umsitnar av Atlanticon, sum heldur til á Bryggjubakka í Havn.

Hilmar Eliassen er útbúgvin cand.merc.jur. Hann arbeiddi sum fulltrúi í Fíggjarmálast‡rinum eitt skifti og á›renn hann kom til Atlanticon arbeiddi hann á lógardeildini hjá Saga Petroleum í Oslo.



Hilmar Eliassen er GEM-samskipari og starvast hjá Atlanticon á Bryggjubakka

Lesarabræv:

Eidesgaard høvdingi í Atlantshavi

Tað íð fær meg at festa nakrar tankar á blað,er hesin stóri høvdingurin mitt úti í Atlantshavinum: Jóannes Eidesgaard! Soleiðis uppfatar hann íð hvussu er seg sjálvan.

Mær vitandi er hann lærari, og nýtir hann sama hátt, íð teir gomlu lærararnir fyrr í tíðini brúktu ímóti næmingum íð kláraðu seg minni væl í skulanum. Ístaðin fyri at bakka hesar næmingar upp, ja stuðla teimum, so varð ógvuliga vanligt at háa og niðurgera hesar næmingar fyri eygunum á restini av flokkinum.

Nú er tað tann meiriluti íð er settur at umboða Føroya fólk, og sum umboðar meirilutan av Føroya fólki, inntil næsta væl, íð hesin taktikkur skal brúkast ímóti. Hesin garpurin, íð hvørja ferð ger tað bragd at háa og spotta landsins hægstu menn, hvørja ferð teir hava verið til sokallaðar samráðingar í Keypmannahavn. Fyri tað um Nyrup ikki duggir vanligan fólkaskikk, og hevur hongt Føroya fólk út sum nassarar og biddarar í donskum fjølmiðlum, og hevur trumfa henda hátt, at samráðast ígjøgnum donsku fjølmiðlarnar, og svína okkum út, nýtist Eidesgård ikki at standa og pissa á samráðingarnevndina, hvørja ferð Nyrup ger tað, myndaliga talað.

Hann er altíð so vísur í,at fólk í hinum norðurlondum og úti í heimi flenna at okkum, ella samráðingarmonnunum, hvørja ferð teir royna at skaffa sær tað vitan teir hava brúk fyri, fyri at styrkja sín førleika at samráðast um hesi ymsu málini, íð danska stjørnin hevur biðið teir um, at siga sær hvussu teir ætla at skipa, í einum frælsum Føroyum. Ístaðin fyri at koma við teimun upplýsingum, íð vit hava brúk fyri, syrgja teir fyri at vit onki kunnu fáa at vita um nakað sum helst, heldur ikki um vit vilja royna sjálvir. Hesir menn stríðast ein harðan kamp, ímóti nøkrum fullkomuliga óvitandi dønum og tveimun grátukonum í Føroyum.

Eg kann vissa Jóannes Eidesgaard um, at eg havi mangan sitið spentur og lurta eftir hetjusøgum, og sæð enn fleiri filmar, um ymsar høvdingar og frælsiskempur, teir komu ikki altíð heim sigrandi; men tað eru kortini ikki hesir menn, íð flent verður eftir, nei teir høvdu eitt mál og eina trúgv uppá seg sjálvar, íð skapar virðing millum manna.

Í hesum somu søgum vóru eisini aðrir menn og kvinnur, íð stuðlaðu makthavarunum og ella teimum fremmandu. Hesum bleiv heldur ikki flent at, nei man vamlaðist við hesar menn, og eg havi heldur ongantíð verið í iva um, at teir vóru skeivt samanskrúvaðir á ein ella annan hátt.

Jóannes Eidesgaard er neyvan soleiðis samanskrúvaður, tí hann hevur fyrr fingið ymiskt av skafti íð prógvar at so hevur ikki altíð verði.

Tað er ikki so,at øll íð ikki meina tað sama sum J. Eidesgaard, eru idiotar og gera seg til láturs, tað er ongin ivi í míni sál, at tað er lítil virðing fyri persónum sum J. Eidesgård bæði tá sæð verður uttan úr heimi, og tá søgubøkurnar verða skrivaðar.

Tað er ein munandi virðiligari støða, íð Jenis Av Rana hevur tikið,hann tekur kanska ikki undir við øllum, íð landsstýrið ger, men hann gerð vart við seg,tá okkurt ikki er sum hann kundi hugsa sær, stuðlar øðrum og gevur monnum arbeiðsfrið. Hann møtir upp til fundir,og er vælsaktans betri inni í tingunum enn restin av andstøðuni, hann arbeiðir fyri sínar veljarar, og fyri Føroya fólk sum heild, ja eitt virðiligt hampafólk, íð bert kann vaksa í metum hjá báðum pørtum, slíkum manni taki eg hattin av fyri.

Til allarseinast, er Jóannes Eidesgaard so ógvuliga upptikin av spælireglum innan heimastýrislógina,íð eiga at verða fylgdar. Tað eru eisini reglur, íð siga at eitt landsstýri situr í fýra ár, ella til samgonga møguliga verður slitin, men tað verða so hvørki J. Eidesgaard ella hin grátukonan íð hava tað uppgávuna, soleiðus eru „spælireglurnar“ nú einaferð, tað var í síðstu samgongu at teir høvdu tann rættin, og teir stungu báðir halan ímillum beinini, tá íð á stóð.Slíkar menn kann ein ikki brúka á hermótinum, tí eitt er at ein hevur ein fígginda yvirav sær, teir sær man, og kann fyrihalda seg til og leggja strategiina hareftir. Vónleyst er við teimun íð liggja aftanfyri, og skjóta sínar egnu í ryggin, slíkum flennir man ikki at, slíkt skammast man yvir.

Heri Johannessen

Borgarstjórin stillar uppaftur

Allir býráðslimirnir hjá Fólkaflokkinum í Klaksvík stilla uppaftur á býráðsvalinum í heyst

Klaksvík: Líkt er til, at allir býráðslimirnir hjá Fólkaflokkinum í Klaksvík stilla uppaftur á komandi býráðsvali.

Fólkaflokkurin skuldi í gjárkvøldið hava triðja uppstillingarfundin, og tað skuldi listin gerast liðugur, um alt gekk sum ætla.

Jógvan við Keldu hevur verið í borgarstjóri í Klaksvík seinastu tvey valskeiðini, og hann stillar uppaftur. Jógvan við Keldu var eisini borgarstjóri í Klaksvík meginpartin av áttatiárunum.

Fólkaflokkurin er størsti flokkur í Klaksvík, og umframt borgarstjóran hevur flokkurin tríggjar býráðslimir. Teir eru Jógvan Lutzen, Kristian Fríðrik Olsen og Erik Andreasen. Hesir tríggir verða sum støðan er nú eisini á fólkaflokslistanum í heyst.

ek

Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík seinastu átta árini, stillar uppaftur á býráðsvalinum í heyst

TIPS 12 úrslit
Vika 36
10.–11. september

1.	AB–Herfølge	2
2.	Haderslev–OB	2
3.	Lyngby FC–Brøndby	2
4.	Silkeborg–AGF	1
5.	Viborg–FC Midtjylland	X
6.	Farum–Brønshøj	1
7.	Frem–FC Aarhus	1
8.	Fremad Amager–Skive	X
9.	Horsens–Ølstykke	1
10.	Vejle–Esbjerg	1
11.	Fredericia–Dalum	1
12.	Kolding IF–HIK	X

Prognosa

12 røtt:	27.824,- kr.
11 røtt:	881,- kr.
10 røtt:	79,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

DUSINO
Vika 36 – 10. september

Vinnaratøl: **01 - 02 - 03 - 05 - 09 - 13 - 14 - 15 - 21 - 22 - 23 - 24**

12 í sama punti:	Eingin vinnari
11 í sama punti:	2.692,- kr.
10 í sama punti:	102,- kr.
9 í sama punti:	25,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Vika 36 – 9. september

Jokaratal:
0 - 1 - 2 - 4 - 9 - 8 - 4

7 røtt:	Eingin vinnari
6 aftastu røtt:	335.382,- kr.
5 aftastu røtt:	23.983,- kr.
4 aftastu røtt:	2.383- kr.
3 aftastu røtt:	260,- kr.
2 aftastu røtt:	52,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Vika 36 – 9. september

Vinnaratøl: **01 - 04 - 05 - 19 - 22 - 24 - 30**
Eykatøl: **28 - 32**

7 vinnaratøl:	2.313.931,- kr.
6 vinnarat.+1 eykat.:	55.122,- kr.
6 vinnaratøl:	3.957,- kr.
5 vinnaratøl:	147,- kr.
4 vinnaratøl:	34,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TIPS 13 úrslit
Vika 36
9.–11. september

1.	Bradford–Arsenal	X
2.	Coventry–Leeds	X
3.	Ipswich–Aston Villa	2
4.	Leicester–Southampton	1
5.	Liverpool–Manchester C.	1
6.	Manchester U.–Sunderland	1
7.	Middlesbrough–Everton	2
8.	Newcastle–Chelsea	X
9.	Birmingham–Sheffield U.	1
10.	Blackburn–Nottingham F.	1
11.	Huddersfield–Bolton	2
12.	Portsmouth–Watford	2
13.	Sheffield W.–Wimbledon	2

Prognosa

13 røtt:	14.734,- kr.
12 røtt:	490,- kr.
11 røtt:	52,- kr.
10 røtt:	12,- kr.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Telefonbókin 2001

Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.

Seinasta freist at lata broytingar inn er ***týsdagin 31. oktober 2000***

Hvítu síður

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

Eykaupptøkur v.m.:
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

Búmerkið:
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).

Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

Gulu síður

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

Prísir:

(A)+(D)	Standardlýsing	kr. 650,00
(B)	Stórt navn	kr. 50,00
(C)	Innramming	kr. 100,00
(E)	Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm)	kr. 20,00

Litlýsingar:
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!

FØROYA TELE

att: Teleforlagið

Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31
www.nummar.fo · info@nummar.fo